# GERÐABÓK

**Dato:** **23. juni 2005**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **117/05-163/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jan Christiansen
Jógvan Arge
Katrin Dahl Jakobsen
Sjúrður Olsen
Leivur Hansen
Bjarti Mohr
Hildur Eyðunsdóttir
Høgni Mikkelsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Kári Árting fyri Marina Katrinu Frýdal
Beate L. Samuelsen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Marin Katrina Frýdal, sum hevur fingið farloyvi

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 16.50:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**129/05 2005-0017**

**Marin Katrina Frýdal hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar vegna annað arbeiði.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kári Árting, eru loknar.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**130/05 2005-0038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 23. juni 2005:** Tikið til eftirtektar.

**131/05 2005-0264**

**Umsókn, dagf. 12. apríl 2005, frá Annie Hansen vegna arvingarnar til matr. nr. 185a, Kollafirði, um at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at øll ognin ella størri partur av ognini verður bústaðarøki.**

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti og broyta byggisamtyktina sambært kortskjali fyri síðani at fáa samlaða økið útstykkjað til 6 grundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollfjarðarnevndin 23. mai 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 23. juni 2005:** Einmælt samtykt.

132/05 **2005-0638**

**Keyp av matr. 1056e tilsamanleggingar við matr. 1056h, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til at Adventistaskúlin, matr. nr. 1056h, hevur ætlanir um at fara undir at byggja ein nýggjan smábarnaskúla við Hoyvíksvegin verður søkt um at keypa matr. nr. 1056e. Um fíggjarnevndin og býráðið samtykkir keypið, skal matr. nr. 1056e leggjast saman við 1056h.

**Lógir og ásetingar:**
Økið liggur í umráðispartinum A1.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Matr.nr.1056e, Tórshavn, er 214 m².

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, treytað av at fíggjarnevndin og býráðið samtykkir at selja matr. nr. 1056e, at loyva at samanleggja matr. nr. 1056e við matr. nr. 1056h og senda málið víðari til fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at selja økið fyri kr. 300,00 fyri fermeturin.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at selja matr. nr. 1056e fyri kr. 300,00 pr. m².

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir til at selja fyri geiraprís, sum er kr. 98,00 pr. m².

**Býráðið 23. juni 2005:** Fyrst var atkvøtt um broytingaruppskot hjá Jan Christiansen um at selja økið fyri kr. 98,50 pr. fermetur, sum fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini sum var samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen, Elin Lindenskov og Jan Christiansen.

Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen greiddu ikki atkvøðu.

**133/05** **2005-1294**

**Langtíðarleiga av øki undir felagshúsinum hjá Kollafjarðar bátafelag við bátahylin við Sjógv í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Kollafjarðar bátafelag biður um byggiloyvi til felagshús við bátahylin við Sjógv í Kollafirði. Økið, har ætlanin er at seta skúrin, er ein partur av lendinum, sum hoyrir til bátahylin.

Grundøki undir bygningum á havnalagnum verða vanliga leigað út, og er tað uttan iva rættast í hesum førinum eisini.

Uppskot er gjørt til langtíðarleigu av økinum við støði í øðrum leigusáttmálum á havnaøkinum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at langtíðarleiga grundøkið undir bygninginum til Kollafjarðar bátafelag.

**Havnanevndin 17. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollfjarðarnevndin 23. mai 2005:** Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá havnameistaranum og at mæla Matrikulstovuni til at frábýta omanfyri nevnda øki.

Samstundis verður mælt til at beina málið um leigu av øki í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Einmælt samtykt.

**134/05** **2005-1295**

**Umsókn frá Faroe Real Estate um at vaksa leigumálið av matr. nr 230s við umleið 300 m$^2$.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Faroe Real Estate langtíðarleigar grundøkið matr. nr. 230s undir virkisbygninginum frá Tórshavnar havn.

Í sambandi við útbyggingina av virkinum er neyðugt at vaksa um matr nr 230s við umleið 300 ferm.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at geva loyvi til at vaksa um matr.nr.230s og at gera átekning um hetta í leigusáttmálanum.

Málið verður beint í byggi-og býarskipanarnevndina um kollfjarðarnevndina.

**Havnanevndin 17. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollfjarðarnevndin 23. mai 2005:** Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við tilmælinum frá havnameistaranum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Einmælt samtykt.

**135/05** **2005-1430**

**Glyvursvegur**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál nr 200100695, har umsitingin saman við ráðgeva legði fram skitsuuppskot um vegaføring av Glyvursvegnum.

Støða skal takast til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at bjóða partar av Glyvursvegi út í innbodna lisitatión. Talan er um vegastrekkið frá Reynsgøtu til økið oman fyri Kvíggjartún (árakað rørportrið á Glyvursvegi oman fyri Fíggjarmálaráðið), og er longdin á vegastrekkinum uml. 500 m.

Skal farast undir fyrireikandi arbeiði nú, er umráðandi at støða eisini verður tikin til, um farast skal undir samráðingar um framtíðarviðurskifti við teir matrikuleigarar, ið búgvar fram við vegnum, tí á ávísum strekkjum verður talan um stóran hæddarmun frá lidnum vegi til verandi lendi, og hesir hava krav upp á at fáa upplýsingar frá kommununi um, hvussu vegarbeiðið ætlandi skal verða frágingið.

Harumframt er eisini neyðugt, at støða verður tikin til um farast skal undir samráðingar við íbúgvar, sum verða noyddir at lata lendi til Glyvursveg.

Vegaarbeiðið kemur at viðføra størri hæddarmun millum nýtt og verandi lendi á fylgjandi matriklum:

- matr. nr. 4 br, Argir
- matr. nr. 4 bg, Argir
- matr. nr. 39b, Argir
- matr. nr. 40d, Argir
- matr. nr. 41a, Argir
- matr. nr. 42a, Argir

Harumframt kemur vegaarbeiði at krevja lendi frá:

- matr. nr. 39a, Argir (vídd 610 m²)
- matr. nr. 40a, Argir (vídd 421 m²)
- matr. nr. 56a, Argir (vídd uml. 9.500 m²).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Kostnaðurin fyri vegastrekkið er leystliga mett til kr. 8 mió. (tá eru útreiðslur fyri projekt og eftirlit, møguliga ognartøku og annars matrikulloysnir ikki tikið við í metingini).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við at bjóða arbeiðið av Glyvursvegi frá Reynsgøtu til rørportrið á Glyvursveg við Kvíggjartún út í innbodna lisitatión skjótast gjørligt,
at umsitingin fer í samráðingar við avvarðandi matrikuleigarar um loysnir at leggja fyri nevndina aftur
at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina
at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
at innkomnu tilboðini verða at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Nevndin samtykti eisini, at vegaprojektið verður umfatað av gongu- og súkklubreyt.

Umsitingin verður biðin um at kanna møguleikarnar fyri at planta viðarvøkstur fram við vegskráunum sum umhvørvisvernd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**136/05** **2005-1094**

**Ústykkingarætlan eystan fyri Karlamagnusarbreyt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til útstykkingarætlan eystan fyri miðstaðargøtuna Karlamagnusarbreyt í Hoyvíkshaganum Suður. Útstykkingin er

staðsett oman fyri verandi Hoyvíkar skúla og út móti Dalinum Langa. Ústykkingin er uml. 22.000 m² til støddar, og er hugsað sum smærri sethúsagrundøkir.

Uppskotið leggur upp til, at heildarætlan skal gerast fyri økið, har miðað verður ímóti at skipa eina tættbygda útstykking við smærri grundøkjum, har nærleikin og felagsøki eru í hásæti.

Lagt verður upp til, at kommunan stendur fyri byggibúning fyri alla ústykkingina. Eftir verður tá bert hjá íbúgvunum at velja sær húsini, sum koma at verða staðsett eftir byggiskipan. Byggiskipanin tekur støðu til staðseting av sethúsum, bil-/úthúsum, felagsøkjum gøtusamband og vegum.

Serstaka heildarætlanin fyri økið tekur støði í einum grundøki upp á 300 m², har uml. 100m² eru lagdir til felagsøki og fríøki. Hinar uml. 200 m² av grundøkinum eru soleiðis, grundstykkið, sethúsið og bilskúrurin verða staðsett í mun til.

Bæði sethús og bilhús verða fyri hvørt stykki sær staðsett eftir byggiskipan, har byggiøkið er 6 x 9 metrar fyri sethús og 4 x 5,5 metrar fyri bilhúsið. Lagt verður upp til, at hvørt stykki sær skal hava 2 parkeringspláss. Loyvt skal verða at byggja hús við kjallara, miðhædd og loft eftir nærri ásetingum um samlaða hædd. Við atliti til, at bil-/úthúsini koma at standa í mark, skulu ásetingar um brunatrygging galda fyri alt bil-/úthúsið.

Lagt verður upp til, at útstykkingin verður skipað sum tríggjar eindir, sum liggja til eitt felagsøki.

Atkoma til hvørt stykki sær verður eftir tilkoyringum frá felagsøkinum. Hvør eind kring eitt felagsøki telur uml. 20 grundstykki. Tilsamans eru uml. 65 bústaðareindir.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskotinum, so at arbeiðast kann víðari við málinum at leggja fyri nevndina, áðrenn útstykkingin verður latin til projektering.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið umrøtt við teknisku deild, og vóru bert smávegis viðmerkingar, sum kunnu loysast í projekteringsfasuni í samráð við teknisku deild.

Eisini hevur verið arbeitt við at broyta húsasniðini, soleiðis at loyvt verður at byggja kjallara og 2 fullar hæddir.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir at lata útstykkingina út til projektering og heitir á fíggjarnevndina um at seta pening av til projektering.

Eisini mælir býararkitekturin til, at eitt uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørd fyri útstykkingina við áseting um staðseting av húsum og útiøkjum, húsasniðum o.ø.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**137/05** **<u>2004-2264</u>**

**<u>Uppskot til skipan av verandi kirkjugarði við Velbastaðvegin.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Málið, sum var ein partur av mál nr. 200101259, "Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin, nýggj lisitation aftaná konkurs", er stovnað sum eitt nýtt mál.

Í samband við at stórar broytingar eru gjørdar, og aðrar eru á veg á Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, hevur býarskipanardeildin gjørt eitt upplegg til hvussu farast kann víðari við beplantningsplan og øðrum rúmskapandi lutum á kirkjugarðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við ætlanini um at gera ein planti- og rúmdeilingssætlan fyri kirkjugarðin, soleiðis at umsitingin kann arbeiða víðari, og at leggja endaligt uppskot fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin**(200101259) **21. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av kirkjugarðinum hevur verið arbeitt við útsjónd og funktión á verandi kirkjugarðsøki.

Hjálagt er skitsuuppskot, sum lýsir hvussu verandi kirkjugarður kann skipast við tí endamáli at gera økið meira nýtiligt og egnað til uppihald.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at kirkjugarðurin verður skipaður sambært skitsuuppskot.

**Støðan primo juni 2005**
Arbeiðið hevur gingið nakað striltið. Partur av plantunum er fingin til vega, og lovar arbeiðstakarin at plantað verður innan ólavsøku.

Biðið verður um annan arbeiðstakara at gera fyrireikandi moldarbeiði. Biðið er eisini um fleiri plantur úr útlandinum.

| | | |
|---|---|---|
| Heildarætlan við planting og túnum kostnaðarmeting: | kr. | 936.000 |
| Onnur arbeiði sum eru í gongd at gera í 2005 eru: | | |
| Garður og tún við nýggja gravarahúsið tilboð J&K | - | 455.000 |
| H. Thomsen grótlaðing tilboð, trappa, rampa | - | 126.000 |
| Liðugtgerð av gravøkjum, mett til | - | 600.000 |
| Asfaltarbeiðið áðrenn ólavsøku, mett til | - | 400.000 |
| Innbúgv til gravarahús - Kapellið | - | 150.000 |
| Tilsamans | kr. | 2.667.000 |
| Haraftrat ráðgervarahonorar o.a. | | |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við ætlanini og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 2.667.000,- av íløgum fyri 2005 til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**138/05** **<u>2005-1422</u>**

**<u>Ytri Ringvegur frá útst. millum Gilja til Klingruna</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Málið um linjuføringina av fyriliggjandi uppskoti hevur verið til viðgerðar í sambandi við samtyktina hjá teknisku nevnd 19. oktober 2004 (sí mál nr. 200402321).

Harumframt hevur Landsverk, saman við umsitingini, havt ein kunnandi fund tann 14. februar 2005 fyri politiska myndugleikanum, har framlagt var eitt nýtt uppskot, sum tekur støði í, at Landsverk ætlar at sleppa ætlanini at gera landsveg á Skarðshjalla, og at íbindingarnar til útstykkingarvegir verða gjørdar við flættingum. (Framløgan er skrásett undir j. nr. 20010407/32).

Nýggja uppskotið líkist tí fyrra - tó verður neyðugt at flyta Ytra Ringveg uml. 10 m longur norður frá verandi íbinding við Løgmannabreyt. Hetta má gerast, um pláss skal gerast fyri planskildi íbindingini (flættingum) við hetta vegamótið.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Víst verður til framløguna tann 14. februar 2005 (j. nr. 20010407/32).

Støða skal takast til um farast skal undir at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti, ella um umsitingin saman við Landsverki skal arbeiða við nýggja uppskotinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við nýggja uppskotinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 7. apríl 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við nýggja uppskotinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin kann arbeiða víðari við spurninginum um at flyta veglinjuna á teininum Løgmannabreyt-Sandvíkarhjalla.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, arbeitt við uppskoti sum tekur støði í, at Ytri Ringvegur verður fluttur á teininum Løgmannabreyt-Sandvíkahjalla. Víst verður til korttilfar í málinum (merkt 2405051/BH) við plássi fyri planskildari íbinding við Løgmannabreyt einaferð seinni.

Samlaða fyrireikandi arbeiðið, ið talan er um at fara undir at bjóða út, er:

1. Ytri Ringvegur frá st. 8.330 til st. 9.275 (kostnaður uml. 12,5 mió. kr.)
2. Brúgv á st. 8.900 (við Løgmannabreyt) (kostnaður uml. 4,5 mió. kr.)
3. Leingjan av Løgmannabreyt og íbinding í Ytra Ringveg (kostnaður uml. 2,0 mió. kr.)
4. Leingjan av Klingruni og íbinding í Ytra Ringveg (kostnaður uml. 2,0 mió. kr.).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fyribilsmetingum verður samlaði kostnaðurin fyri nevndu arbeiði mettur til uml. 21 mió. kr.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við at bjóða omanfyri nevndu arbeiði (1,2,3 og 4) út í innbodna lisitatión skjótast gjørligt,
at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina,
at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina,
at innkomnu tilboðini verða at leggja fyri teknisku nevnd aftur

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, tó so at arbeiðið skal verða boðið út í almennari lisitatión skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**139/05** **2005-1424**

**Íbinding í Ytra Ringveg - Leingjan av Flatarvegnum**.

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við fyrireikandi arbeiði at koma ásamt við Landsverk um íbindingarnar til Ytra Ringveg hevur sum kunnugt samskifti verið við stovnin.

Tekniska nevndin samtykti tann 30. september 2003 at taka undir við at Landsverkfrøðingsstovnurin fór undir at gera veg frá Flatarvegnum, og at Landsverkfrøðingsstovnurin tók arbeiðið at gera atkomuveg fram við Flatarvegin sum serskildur postur í teirra útbjóðingartilfari, og at kommunan skuldi rinda kostnaðin fyri vegin.

Talan tá var um at fara undir ein arbeiðsveg, sum í fyrstu atløgu skuldi vera til gagns fyri atkomu til arbeiðstakaran, ið skuldi gera vegarbeiðið fyri Landsverk, og var mett, at kostnaðurin fyri hetta arbeiði var uml. kr. 500.000,-.

Landsverk sendi kommununi uppskot til sáttmála um arbeiðið av hesum vegastrekki, men Landsverk fór undir arbeiðið, uttan at kommunan hevði skrivað undir sáttmálan.

Staðfest var á fundi í teknisku nevnd tann 29. mars 2004, at vegarbeiðið var gjørt, og at nevndin ikki vildi taka støðu til fíggingina av arbeiðinum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Støðan í dag et sostatt tann, at Landsverk hevur latið gera partar av arbeiðinum at leingja Flatarvegin, og at stovnurin sostatt hevur kr. 704.731,81 útistandandi.

**Tilmæli:**
Tað at Landsverk eru farnir undir vegarbeiðið uttan at hava gjørt neyðugu avtaluna við Tórshavnar kommunu, tilskilar ikki kommununi rætt til at afturhalda útgoldnan pening fyri arbeiðið.

Vísandi til áður gjørda samtykt at kommunan skal rinda fyri íbindingarnar til Ytra Ringveg, mælir býarverkfrøðingurin til at fíggja kr. 704.731,81 av íløgum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**140/05** **<u>2005-1432</u>**

**<u>Liðugtgerð av Marknagilsvegnum</u>.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Farið var undir at breiðka Marknagilsvegin seinast í 1998 og nú eru nærum einans matrikulloysnirnar eftir at gera. Hetta eru arbeiði, sum kommunan má gera í samráð við íbúgvar fram við vegnum. Víst verður til framløguna hjá umsitingini tann 21. apríl 2005. (j. nr 2005-1402/1).

Samlaði fíggjarligi tørvurin fyri liðugtgerðina er uml. 4,5 mió. kr. Umsitingin greiðir frá fíggjartørvinum.(2001-1461/33).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 3,7 mió. av íløgum, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**141/05** **2005-1435**

**Uppskot til burturveiting av spillvatni frá Vestaru vág - Reinsan av Vestaru vág (Kloakkarbeiði Tróndargøta-Dalavegur)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við arbeiðið „Reinsan av Vestaru Vág" stig 1A Havnará-Tróndargøta er arbeiðið um at verða liðugt.

Spurningurin er so, um haldast skal fram niðan móti Dalavegnum, 100 m. Sí tekning frá Sp/f Martin Leo.

Sp/f Plan v/ Jóannesi Hellisdal vil halda fram við arbeiðinum fyri somu einleikaprísir sum verandi arbeiði. Tilboðið frá honum fyri næstu 100 metrarnar er kr. 550.909,40, harumframt kemur so kostnaðurin fyri MVG, projektering/eftirlit, ókent og asfaltering.

Samlaður kostnaður kr. 1.015.341,20, sí annars hjáløgdu kostnaðaruppseting.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at støða skal takast til um:

1) Sp/f Plan v/ Jóannesi Hellisdal heldur fram við arbeiðinum undir somu treytum sum nú.
2) Arbeiðið skal bjóðast út í innbodna lisitatión innan summarferiuna, soleiðis at farast kann undir arbeiðið seinast í august 2005.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við, at sp/f Plan, v/ Jóannesi Hellisdal, heldur fram við arbeiðinum undir somu treytum sum nú og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**142/05** **2002-0948**

**Áheitan frá íbúgva í Reynsgøtu, dagfest 2. apríl 2002, um liðugtgerð, umvæling og viðlíkahald av vegastrekkinum Reynsgøta 51 til 81**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Útstykkingin liggur tætt uppi at einum hamri á Argjum, og upplandið er stórt. Hetta hevur ført við sær, at trupulleikar av yvirflatuvatni hava verið á staðnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at farið verður undir at gera kanningararbeiðið, ið skal lýsa støðuna á allari Reynsgøtu soleiðis, at farast kann undir at gera eina heildarætlan fyri økið.

**Tekniska nevnd 14. mai 2002:** Farið varð á staðið.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og ynskti, at kanningararbeiðið verður lagt fyri nevndina aftur til heystar í ár.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið skitsuuppskot frá sp/f Verkfrøðingastovuni.

Uppskotið tekur støði í:

at Reynsgøta verður breiðkað til o.u. 7 m
at almenn p-pláss verða gjørd
at inntøk og dren verður at leggja í ovara borði, sum skal taka ímóti yvirflatuvatni
at evt. garðar/múrar verða gjørdir við mark.

Saman við uppskotinum verður løgd fram ein fyribils kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Tekniska nevnd 3. desember 2002:** Nevndin samtykti at farast skal undir at projektera og bjóða arbeiðið út at veita yvirflatuvatn í skipaða veiting sambært fyriliggjandi skitsuuppskoti frá p/f Verkfrøðingastovuni, tekn. nr. 11, dagfest 4. november 2002, beinanvegin.

Nevndin samtykti eisini at farast skal undir at projektera og bjóða út liðuggerð av Reynsgøtu sambært skitsuuppskoti frá p/f Verkfrøðingastovuni, tekn. nr. 11, dagfest 4. november 2002, við støði í, at verandi vegur verður nýttur aftur og at útvega fleiri p-pláss.

Eisini samtykti nevndin at hava projektið til støðutakan, áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út.

Nevndin hevur ikki tikið støðu til fíggjarliga spurningin í málinum.

**Ískoyti:**
Tikið er av undirhondsboði frá arbeiðstakara at veita yvirflatuvatn í skipaða veiting á økinum oman fyri Reynsgøtu. Farið verður undir arbeiðið í næstum, og mett verður at arbeiðið er liðugt í mai 2003.

Umsitingin leggur fram projekt við kostnaðarmeting og tíðarætlan av arbeiðinum at ístandgera Reynsgøtu.

**Tekniska nevnd 25. mars 2003:** Meðan hetta mál var viðgjørt, var Høgni Mikkelsen ikki á fundi.

Nevndin tekur undir við uppskoti j. nr. 200200943/23, men vil hava upplýst til næstkomandi fund, um kommunan áður hevur luttikið í kostnaðinum at gera stuðlamúr ella garð millum kommunalt vegaøki og privat øki.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt notat (j. nr. 200200948/25) viðvíkjandi spurninginum um arbeiði hjá kommununi við Reynsgøtu 65-67.

**Tekniska nevnd 6. mai 2003:** Nevndin samtykti, at umsitingin innkallar nevndina fyri eigarafelagið til fundar.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við íbúgvarnar 16. juni 2003. (j. nr 200200948/32)
Eisini hevur umsitingin móttikið eina løgfrøðisliga meting av ábyrgdarøkinum hjá kommununi í hesum málinum (j. nr. 200200948/35).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at kommunan fer undir at asfaltera Reynsgøtu so langt út ímóti marki, sum tað letur seg gera.

**Tekniska nevnd 4. november 2003:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Schumann Hjaltalin og Høgni Mikkelsen, samtykti at fara undir at gera neyðugar ábøtur og asfaltera vegin.

Ein minniluti, Leivur Hansen, mælir til, at kommunan ger vegin lidnan í samráð við íbúgvarnar á staðnum, vísandi til løgfrøðiligt responsum frá Chr. Andreasen, adv.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at umsitingin er farin undir fyrireikingar til at gera neyðugar ábøtur á Reysgøtu, hava nakrir av íbúgvunum sett seg í samband við kommununa um málið viðv. liðuggerð av stuðlamúri við teirra ogn.

Í uppskoti um býti at útreiðslunum fyri liðuggerð - herundir fyri stuðlamúr, hava eigararnir av matr. nr 4fv, Argir og 4cg, Argir, boðað frá, at teir eru sinnaðir at

rinda fyri kostnaðin at gera stuðlamúrin frá lidnum bakkanti av vegi og 1 m niður. Greitt verður nærri frá uppskotinum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Greitt verður frá fíggjarligu viðurskiftunum á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við uppskotinum at býta kostnaðin fyri liðuggerðina.

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Greitt verður frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 19. oktober 2004:** Nevndin samtykti at fara undir at gera stuðlamúr við ognirnar matr. nr. 4cg og 4fv og at gera kostnaðarmeting fyri restina av vegnum, herundir neyðugar lendistryggingar av niðaru síðu, kant á niðaru síðu, avvatning og asfaltering, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt kostnaðarmeting av liðugtgerð av Reynsgøtu 51-83 - tilsamans kr. 2.700.000,-.

**Tekniska nevnd 28. apríl 2005:** Nevndin samtykti at heita á býráðið um fíggjarnevndina

at útvega pening til arbeiðið
at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatiðón skjótast gjørligt, og
at leggja málið fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, krevur, at 7 arbeiðstakarar verða bidnir um at bjóða.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2005:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd til at ávísa fígging.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at heita á býráðið um fíggjarnevndina

at figgja arbeiðið av íløgum fyri vegir.
at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión skjótast gjørligt, og
at leggja málið fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

143/05 2004-2696

**Áin frá Sortudíki/Norðara Ringveg oman í Hvannkrók 10/Heinagøtu 21**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Trupulleikar hava staðist av yvirflóð frá ánni í vetur - og illa slepst til at reinsa frá ristini fyri rørið í Hvannkróki 10 og undir Heinagøtu 21.

Trupulleikar hava verið í sambandi við yvirflatavatntrupulleikar, og hevur trygg-ingarfelag víst á, at um kommunan ikki ger ítøkiligar ábøtur kann væntast, at tryggingin ikki tekur við framtíðar vatnskaðum.

Tekniska deild hevur gjørt uppskot um eina bráðfeingis loysn av trupulleikunum við kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at áin verður løgd í rør frá ringvegnum oman í rørið við Heinagøtu 21 sambært uppskoti frá umsitingini, og at málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiðið út, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið undirhondsboð upp á arbeiðið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at fíggja arbeiðið av íløgum og at farið verður undir at bjóða arbeiðið út seinni.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá sp/f Maskinkoyring, dagf. 18. apríl 2005, áljóðandi 722.514,00, og játta kr. 1.040.000,00 av íløgum fyri kloakkir 2005, sambært skjali dagf. 2004-2696/22.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**144/05** **2005-1175**

**Viðvíkjandi yvirtøku av vegøki á matr. nr. 1038bi,Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarin av matr. nr. 1038bi, Tórshavn, søkir um at kommunan yvirtekur matr. nr. 1038bi, Tórshavn, tað eru vegirnir Norðurrás, Miðrás og Suðurrás.

Tekniska deild hevur kannað vegirnar og vísir í notati í málinum á, at vegirnir eru frá útstykking frá seinast í 1960'unum ella fyrst í 1970'unum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at yvirtaka vegøkið.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**145/05** **2004-2541**

**Nýggj kloakkskipan í Hesti**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Hest kommuna hevur í skrivi, dagf. 27. november 2004, boðað frá, at kloakkarbeiði í Hesti er boðið út í innbodna lisitatión, sum var hildin 2. november 2004.

Tilboð er komið frá p/f J&K Contraktors, ið hevði lægsta boð áljóðandi kr. 2.444.621,- v/6,25% MVG.

Samanlagdur kostnaður incl. projekt, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur v.m. verður mettur til 3.246.000,- kr.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir frá at býta arbeiðið upp, men í staðin til at fíggja arbeiðið av íløgum seinni.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka av tilboðnum hjá p/f J&K Contraktors áljóðandi 2.444.621,00 og at heita á býráðið, um

fíggjarnevndina, at fíggja kr. 3.246.000,00 av íløgum fyri kloakkir og at fara undir arbeiðið skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**146/05** **2002-0721**

**Miðstaðargøta/-øki í Hoyvíkshaganum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva latið gera projekt við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri vegarbeiðið við veitingum av mistaðargøtuni Karlamagnusarbreyt.

Í uppskotinum eru viðurskifti viðv. busskoyringini viðgjørd og mett verður, at eingin busskoyring eigur at koyra eftir mistaðargøtuni. Arbeiðsøkið, ið talan er um, er frá komandi Torginum við Kirkjustrætið og niðan til vegamótið til útstykkingina Hoyvíkshaga Suður.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við fyriliggjandi projekti (j. nr 200200721/26)
at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina
at leggja málið fyri fíggjarnevndina
at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevndin 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at halda felagsfund við byggi- og býarskipanarnevndina í komandi viku.

**Tekniska nevnd & byggi- og býarskipanarnevndin 9. mars 2005:** Nevndirnar samtyktu at taka undir við fyriliggjandi projekti j. nr. 200200721/26 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og at fíggja 1/3 upp til kr. 5.000.000 av konto 90 og at leggja upp til kr. 10.000.000 út av samlaðu kostnaðarmetingini uppá kr. 15.000.000.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin á teknisku deild 30. mai 2005, kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol (j. nr. 2002-0721/44), og tilmæli verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum at taka undir við tilboðnum frá p/f Guttesen & Staksberg, áljóðandi kr. 12.221.397,00, sambært lisitatiónsprotokoll, dagf. 30. mai 2005, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**147/05** **2005-0916**

**Mál um støðutakan til p-avgjald fyri ólógliga parkering**

**Lýsing av málinum/samandráttur:**
Í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagf. 5. apríl 2005, heitir Runavíkar kommuna á borgarstóran um at heita á Vinnumálaráðið um at hækka gjaldið fyri ólógliga parkering úr kr. 200,- upp til kr. 300.-.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at nevndin tekur støðu til, um Tórshavnar kommunan skal taka undir við áheitanini frá Runavíkar kommunu.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Fyri at bøta um parkeringsmøguleikarnar í býnum samtykti nevndin at taka undir við at hækka gjaldið fyri ólógliga parkering úr kr. 200,- upp til kr. 300,- og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Fyrst var atkvøtt um uppskot frá Beate L. Samuelsen um at áseta gjaldið til kr. 199,00, sum fall við 3 fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

**148/05** **2003-2394**

**Byggiskrá og betran av hølisviðurskiftinum av Argja skúla**

Í sambandi við hølisviðurskiftini í Argja skúla hevur verið arbeitt við uppskotum um út- og umbygging av skúlanum síðstu árini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at gera arbeiðsskrá fyri Argja skúla, sum fevnir um ein tvey sporaðan skúla frá 1. fl. til 9. fl., og biðið verður um at játta kr. 100.000,00 til arbeiðsskrá av íløgum 2003, sum er tøkt.

Fyri at betra um verandi hølisviðurskiftir verður mælt til at gera smærri broytingar í verandi skúla, og at 10. flokkur verður fluttur í Heimara skúla frá august 2004.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera eina arbeiðsskrá fyri skúlan á Argjum, og at umboð fyri skúlan eru við í arbeiðsbólkinum.

**Uppískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur var settur, har arbeiðssetningurin var soljóðandi:

**Arbeiðsskrá:**
Við hesum verður heitt á arbeiðsbólkin um at gera arbeiðsskrá til betran av hølisviðurskiftunum fyri Argja skúla, soleiðis at skúlin lýkur tey krøv, ið sett verða til skúlabygningar sambært nýggju fólkaskúlalógini.

**Arbeiðssetningurin er soljóðandi:**
Arbeiðsbólkurin skal gera uppskot til arbeiðsskrá til betran av hølisviðurskiftunum fyri Argja skúla, ið verður ein 2-sporaður skúli við frítíðarskúla til 1. og 2. flokk.

**Arbeiðsskráin skal m.a. fevna um:**

- Námsfrøðiligar hugsjónir
- Hølisskrá
- Uttanduraøki
- Tíðarætlan
- Kostnaðarkarm

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt eina arbeiðsskrá, sum verður framløgd á fundinum.

**Mentamálanevndin 3. november 2004:** Arbeiðsskrá fyri betran av hølisviðurskiftum í Argja skúla, dagfest november 2004, var framløgd av arbeiðsbólkinum, og nevndarlimirnir fingu útflýggjað bókling við arbeiðskránni.

Málið verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at játta kr. 200.000,00 til at gera byggiskrá. Peningur er tøkur á íløgum á skúlanum 2003.

**Mentamálanevndin 24. november 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og senda málið í teknisku fyrisitingina.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 til arbeiðsskrá av íløgum 2003, sum er tókt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt eina byggiskrá, dagfest mai 2005, sum verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli frá arbeiðsbólkinum:**
Í tilmælinum liggur at byggja ein nýggjan smábarnaskúla í skúlagarðinum, sum verður sambundin við verandi gamla skúla (1. byggistig).

Meðan 1. byggistig verður bygt, er neyðugt at flyta næmingarnar í onnur høli. Torført er at finna hóskandi høli á Argjum. Tí verður neyðugt at keypa fyribils skúlastovur.

Eftir at 1. byggistig er liðugt um ársskiftið 2006/07 verður farið undir 2. byggistig, sum fevnir um at byggja eina hædd omaná verandi nýggja skúla. Tá verða tað teir eldru næmingarnir, ið koma at ganga í fyribilshølunum. Teir yngstu næmingarnir flyta tá í nýggja smábarnaskúlan.

2. byggistig verður liðugt um árskiftið 2008/09.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin og býararkitekturin mæla til at játta 2 mill. kr. til dispositiónsuppskot til 1. og 2. byggistig og projektering av 1. byggistigi.

At játta 3,5 mill. kr. + mvg. til keyp av trimum fyribils skúlahølum, t.v.s. 6 skúlastovur.

Jørðarbeiðið verður boðið út, eftir at dispositións uppskotið er góðkent, og verður mælt til, at jørðarbeiðið verður boðið út í undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta 5,7 mill. kr. av íløgum.

Eisini samtykt at góðkenna byggiskránna, dagf. mai 2005, og at senda málið til ummælis hjá skúlastýrinum á Argjum.

**Ískoyti:**
Skúlastýrið fyri Argja skúla viðmælir byggiskránna við teirri viðmerking, at ynskiligt hevði verið, at talan var um 4 fyribilsskúlastovur, har hvør rúmar 2 skúlastovur.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**149/05** **2001-1568**

**Umsókn í sambandi við uttanumøkið við nýggja skúlan í Kongagøtu**.

Uttanumøkið var ikki við í tí samlaða projektinum at byggja skúlan. Bygginevndin og býararkitekturin mæla til at arbeiðið verður gjørt í summar.

Michael Jacobæus frá býarskipanini kemur at greiða frá málinum

**Kostnaðarmeting:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Nýgerð av uttanduraøki | kr. | 530.000,00 |
| 2. | Projektering og eftirlit | - | 75.000,00 |
| 3. | Nýtt hegn móti frk. Cohr | - | 48.000,00 |
| | | kr. | 653.000,00 |

Byggideildin hevur gjørt eitt skitsuuppskot og kostnaðarmeting av uttanumøkinum til barnaskúlan hjá kommunuskúlanum. Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 693.812,50 v/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 700.000,00 av íløgum á skúlaøkinum 2005.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

Nevndin samtykti samstundis at heita á býarskipanardeildina um at gera uppskot til heildarætlan fyri urtagarðarnar við Kommunuskúlan og Kongagøtu.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Fyrst var atkvøtt um uppskot frá Sjúrði Olsen um at senda málið í byggi- og býarskipanarnevndina, sum var samtykt við 8 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin D. Jakobsen og Elin Lindenskov.

Leivur Hansen og Kári Árting greiddu ikki atkvøðu.

**150/05** **2002-1943**

**Viðvíkjandi spæliplássinum í Barnagarðinum millum Bóla í Kollafirði**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Barnagarðurin millum Bóla hevur nú virkað í sløk tvey ár, men enn er spæliplássið ikki liðugt. Stykkið norðanfyri er sera vátt og skal drenast, um tað skal verða nýtiligt hjá børnunum at spæla á. Reiggjur, dandur, glíðibreyt o. a. er einki av. Eisini mangla tey hegn sunnanfyri húsini.

Harumframt liggur ein ógoldin rokning eftir frá tí, at stovnurin varð bygdur uppá kr. 25.000. Michael Jacobæus hevur gjørt uppskot um, hvussu gerast kann eitt mennandi, spennandi og trygt spælipláss.

Byggideildin hevur viðgjørt ætlanina og metir, at spæliplássið fer at kosta kr. 100.000,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 125.000,00, av íløgunum á barnaansingarøkinum 2005, soleiðis at Barnagarðurin millum Bóla kann fáa eitt nøktandi spælipláss til børnini.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og senda málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**151/05** **1999-0366**

**Viðvíkjandi uppskoti til ískoyti til § 14 í upptøkureglunum um systkina-avslátt**

**Lýsing av málinum –samandráttur:**
Fyri at lætta um fíggjarliga hjá smábarnafamiljum eru ætlanir um at veita foreldrum, ið hava fleiri børn í barnaansing, 25% í avsláttri fyri systkin.

Sambært Roknskapardeildini fer tað at kosta kommununi kr. 1.554.498 í eitt ár at veita 25 % í avsláttri.

Skotið verður upp, at reglurnar fyri systkinaravslátt, verða partar av § 14 í upptøkureglunum og ljóða soleiðis:

**§ 14**
**Gjaldsreglur**

**Stk. 1.** Við heimild í § 6 í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt frá 1. juli 2000, hevur landsstýrið fyrisett at:

Avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum standast av virkseminum sambært hesi lóg. Foreldragjaldið skal tó í mesta lagi vera 30% av rakstrarútreiðslunum. Tó rindar kommunan 100% av húsaútreiðslunum.

**Stk. 2.** Gjaldið fyri at hava børn í dagrøkt ella á dagstovni verður ásett av býráðnum. Fíggjarætlanin fyri skipanina skal nýtast sum grundarlag fyri ásetanini av gjaldinum

**Stk. 3.** Hava foreldur fleiri børn í ansing, gjalda tey fult gjald fyri dýrasta barnið og 75% fyri systkini.

Systkin eru:

- Biologisk systkin, ið bæði búgva hjá antin faðir ella móður, ið hevur foreldramyndugleikan
- Ættleitt systkin, stjúksystkin, sum hava sama bústað sambært fólkayvirlitið
- Fyri at fáa systkinaavsláttur skal barnið búgva í Tórshavnar kommunu
- Búgva foreldrini ikki saman, men hava felags foreldramyndugleika, verður barnið roknað sum systkin, har barnið býr sambært fólkayvirlitinum, óansæð um barnið býr líka leingi hjá báðum foreldrunum.

Reglurnar fevna um børn, sum ganga í dagrøkt ella á stovni, íroknað FTS sambært løgtingslóg um dagrøkt og dagstovnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at seta systkinaravsláttur í verk frá 1. august 2005 at rokna - og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 650.000 til endamálið.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 650.000,00 av reguleringskontoini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**152/05** <u>**2005-1458**</u>

<u>**Viðvíkjandi víðkan av frítíðarskúlanum til eisini at fevna um 2. flokk komandi skúlaár**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í vetur varð bólkur settur at arbeiða við, hvussu frítíðarskúlin skal skipast í framtíðini. Bólkurin arbeiðir framvegis við málinum, men nú er komið undir land við ,hvar 2. flokkur fer at húsast komandi skúlaár.

Á Argjum fer 1. flokkur í skúla seinnapart og frítíðarskúla fyrrapart. 2. flokkur er í skúla fyrrapart og í frítíðarskúla seinnapart. 1. flokkur hevur eisini møguleika fyri

at koma á frítíðarskúla, tá tey eru liðug um hálvgum trý tíðina. Talan er um áleið 66 børn tilsamans.

Børnini í 1. og 2. flokki á Venjingarskúlanum ganga í skúla fyrrapart og eru í frítíðarskúla í Hornabø og í Grønlendingahúsinum, eisini húsini hjá ríðingarfelagnum í Havnardali er knýttir at frítíðarskúlanum í Hornabø. Áleið 90 eru knýtt at hesum frítíðarskúlum.

Børnini í 1. og 2. flokki í Eysturskúlanum ganga í skúla fyrrapart og í Smílibýlinum í Stoffalág 82 seinnpart. Talan er um áleið 60 børn.

1. flokkur í Hoyvíkar skúla er í skúla seinnapart og 2. flokkur fyrrapart. Bæði 1. og 2 flokkur ganga í frítíðarskúlanum í Stoffalág 60. Børnini verða koyrd í bussi í og úr skúla. Tá 1. flokkur er liðugur um hálvgum trý tíðina, verða tey ansað í Hoyvíkar skúla til kl. 17.00. Talan er um áleið 100 børn tilsamans.

Forskúlin í Sankta Frans skúla fer í Miðstovnin, Túgvuna og Bridgehúsið eftir skúlatíð. Talan er um áleið 40 børn. Í Miðstovninum ganga eisini børn undir skúlaaldur og hevur stovnurin opið, tá skúlin hevur frí. Foreldur hava seinastu árini aftrað seg við at lata børnini í forskúla, tí tey fáa ikki børnini ansað, tá skúlin hevur frí.

Miðstovnurin skjýtur upp, at hesi børnini fáa møguleika fyri at vera har í skúlafrítíðini. Hetta ber í sær, at stovnurin fær eina hægri játtan pr. barn. Talan er um kr. 90.000 í ár. Møguliga fáa vit fleiri børn inn her, sum ikki rúmast á hinum frítíðarskúlunum.

1. flokkur í Sankta Frans skúla heldur til í Badmintonhøllini og annar av teimum báðum 2. flokkunum í Sankta Frans skúla. Talan er um 66 børn.

Í frítíðarstovuni í KFUM er hin 2. flokkurin í Sankta Frans skúla. Eisini børn úr 1. og 2. flokki á Sernámsdeplinum halda til her. Talan er um at leiga tvey høli afturat í KFUM, soleiðis at 1. og møguliga 2. flokkur í Adventistaskúlanum kunnu fáa pláss. Talan er um áleið 35 børn.

1. og 2. flokkur í Kommunuskúlanum fer í Dr. Ingridar barnagarð (eitt sindur óvist enn, um 2. flokkur rúmast her)

Higartil eru kr. 1.800.000 settar av til víðkan av frítíðarskúlunum. Skulu øll tey, ið hava tørv á frítíðarskúla fáa boðið pláss, er neyðugt at hækka játtanina.

| | | |
|---|---|---|
| Leiga Grønlendingahúsið frá 01.08.05 til 30.12.05 | kr. | 40.000 |
| Leiga Bridghúsið í 1. ár | - | 66.000 |
| Spírin | - | 30.000 |
| Leiga eyka høli í KFUM frá 01.08.05 | - | 30.000 |
| Innrættan av hølum og tilfar | - | 60.000 |
| Miðstovnurin opið tá skúlin hevur frí | - | 90.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 200 børn í 2. flokki í ár | - | 1.884.000 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **2.600.000** |
| | | |
| Sett av á fíggjarætlanini í 2005 | kr. | 1.800.000 |
| Sett av á íløgujáttani í 2005 | kr. | 800.000 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at góðkenna omanfyri nevndu ætlan og játta kr. 1,8 millión til rakstur, og at kr. 800.000 verða játtaðar av íløguætlanini 2005.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 800.000,00 av íløgunum 2005.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**153/05** **2004-1156**

**Skriv frá byggideildini í sambandi við at gera bóltvøllin við Hoyvíkar skúla lidnan.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Byggideildin hevur kannað, hvat tað kostar at gera vøllin lidnan, so hann kann brúkast til tað, hann er ætlaður til. Byggideildin hevur gjørt niðanfyri nevndu kostnaðarmeting

**Kostnaðarmeting:**

| | | |
|---|---|---|
| Hegna 3,0 m høgt sama slag, sum er frammanundan | kr. | 61.445,00 |
| Gera moldvøll og dren, við fiburdúki oman á gróti | - | 35.410,00 |
| Festa graslíkisvøllin við jarnskinnara | - | 8.100,00 |
| Leggja oljugrús millum hegnið og graslíkisvøllin | - | 6.080,00 |
| Gera 2 stk mál úr 2” røri | - | 5.200,00 |
| | kr. | 116.235,00 |
| MVG 25% | - | 29.058,75 |
| | kr. | 145.293,75 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við byggideildini og mæla til at játta kr. 150.000,00 av íløgum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og senda málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**154/05** **<u>1999-0606</u>**

**<u>Skipanarætlan fyri rennibreyt á Hálsi</u>.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur, vísandi til mentamálanevndarsamtyktina dagfest 24. juni 2003, og samtyktina í byggi-og býarskipannevndini j. nr. 9902090-1, gjørt skipanarætlan fyri økið á Hálsi har ein rennibreyt er staðsett.

Uppskotið skipar økið við einari rennibreyt við 8 geirum og einum fótbóltsvølli inni í miðjuni.

Øki er lagt av til parkering og møguligar bygging til virksemið.

Skipanarætlanin leggur upp til at ásetingarnar fyri fyri økið skulu broytast frá at vera C2 - opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki fyri tað økið har rennibreyting liggur.

Ætlanin hevur eisini við sær, at onnur vegatgongd skal finnast til matr.nr. 1394 – sethús og grundstykki og matr.nr. 1408 b og 1408 c – ogn hjá Føroya Tele (dag-stovnurin KURLAN).

Ein slík rennibreyt við einum fótbóltsvølli í miðjuni hevði verið eitt skilagott upp-ískoyti til Gundadal og á Hálsi sum ítrottarøkið.

Hjálagt er uppskot til skipanarætlan j. nr. 200202698-4

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at arbeitt verður víðari við málinum, og at ein byggiskrá verður gjørd fyri verkætlanina.

**Mentamálanevndin 21. apríl 2004:** Samtykt at arbeiðssetningurin verður soljóðandi:

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkur verður settur at gera eina byggiskrá til ger av rennubreyt við tilhoyrandi økjum og útgerð í Tórshavnar kommunu.

**Byggiskráin skal m.a. innihalda:**

- Skipanarætlan fyri økið á Hálsi, sambært j. nr. 9902090-1, sum plandeildin hevur gjørt, herundir:
  - Stødd, plasering o.a.
  - Uttanduraøki
  - Hølisskrá
  - Atkomuviðurskifti
  - Útbyggingarmøguleikar

- Ognarviðurskifti

- Tíðarætlan

- Leiðbeinandi kostnaðarmeting, býtt sundir í:
  - Undirlendisarbeiðið
  - Breyt við 8 geirum
  - Miðøki við einum fótbóltsvølli
  - Uttanumøki, atkoma, parkering og møguligar bygging til ymiskt virksemið, t.d. gistingarhús.
  - Møguliga atkoma til verandi stadionøki

Bólkurin eigur eisini at hava fyrilit fyri myndugleikakrøvum og øðrum viðurskiftum, soleiðis at hesi verða lýst, nevnast kann m.a.:

at byggisamtyktini skal broytast frá at vera C2 – opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki.
at kommunan má ogna sær uml. 4000 $m^2$ frá matr.nr. 1393.
at vegatgongd til grannaognir skulu fáast upp á pláss.

Byggiskráin skal leggjast fyri mentamálanevndina í seinasta lagi 30. juni 2004.

Eisini samtykt at arbeiðsbólkurin hevur 3 limir:
1 umboð fyri Trivnaðarfyrisitingina, sum verður formaður
1 umboð fyri Teknisku fyrisitingina og
1 umboð fyri Sersamband fyri frælsan ítrótt
og at játta kr. 200.000 av konto 64 til byggiskránna.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Málið varð lagt fram og verður arbeitt víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur eftir summarfrítíðina.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avgerandi fortreyt fyri at økið kann brúkast til rennibreyt, er at broyting verður gjørd í byggisamtyktini, har økið verður broytt frá C2-opin miðstaðarbygging til at verða D2, ítróttarøki.

Serstøk byggisamtykt er fyri lítlan part av økinum, sum er kannaður traðarbrúki og velt lendi. Men við atliti til, at talan er um so lítlan part av verkætlanini sum verður umfataður av hesum, og vísandi til at aðrir vegir eru lagdir í økinum undir somu ásetingum, metir býararkitekturin ikki at hetta kann hava við sær at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtykt 22. mars 2004, tá byggi- og býarskipanarnevndin góðkendi skipanarætlan fyri økið, soleiðis at arbeiðast kundi víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur. Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við ætlanini, so at farast kann undir at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við ætlanini, og at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjali 1999-0606/32, dagfest 13. juni 2005, frá C2 øki til D2 øki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest 14. juni 2005, og at játta peningin, kr. 700.000,00, ið er tøkur á konto 64, til projektering

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**155/05** **2004-1691**

**Byggjan av ítróttarbygningi (fimleikahallir) við norðara enda á Tórsvølli.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Byggideildin hevur gjørt eitt uppskot til bygging av norðara skýli á Tórsvølli.

Uppskotið er ætlað sum eitt boð uppá, hvussu skýlisbygningur kann kombinerast við privatar og almennar funktiónir upp at einum almennum útirúmi í form av einum torgi. Umráðandið hevur verið, at bygningur og útirúm spæla saman á ein hátt, sum leggur upp til, at aðrar komandi byggingar í økinum styrkja ”torgið”, sum er ætlað at gerast eitt centralt øki í Havnini. Umráðandi hevur tískil verið, at stovuhæddin á allari bygging í økinum hevur eina almenna og eksterna funktión.

Somuleiðis eigur at verða lagt upp til ein byggistíl, sum kann førast aftur til økið og tað sermerktu funktión, sum økið er myndað av og virkar undir.

**Arkitektoniska sniðið**
Arkitektoniska sniðið er grundað á siðvænt stadionsbyggjarí tó soleiðis, at virksemið hjá ÍSF hevur myndað fasaduloysnir og innrætting.

ÍSF er sambandið hjá øllum sersambondunum og tískil myndað av fjølbroyttum virksemi og áhugamálum. Tó er tað eisini soleiðis, at ÍSF stendur sum felagsnevnara hjá øllum - leggur seg sum samlandi karmur um sersambondini.

Hesin metafysiski áskoðanarhátturin er grundarlagið undir fasaduloysnini, har roynt er at leggja áherðslu á konstruktiónir sum rammur um hølisinndeilingina, við øllum sínum skrivstovum til sersambondini og ymiskum funktiónum, sum sleppur at markera seg úti í fasaduni.

**Norðara tribuna á Tórsvølli**
- til alment endamál er í miðhæddini út til “ítróttartorgið”
- skrivstovuøkið er á 1. hædd
- ítróttarrúm eru í niðastu hædd

**Ásetingar fyri økið:**
Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Økið í Gundadali kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggi-samtykt fyri økið.

Býráðið kann áseta í pørtum av grundumráði 1, 2 og 3, at ongar skrivstovur ella líknandi virksemi verður í veghædd.

Fyri at tryggja eitt alment myndað umhvørvi í økinum framyvir verður skotið upp, at ásetingar verða lisnar í skeytini, um at at ítrottar-, resturantións-, handils- og mentunavirksemi skulu verða í veghædd.

Eisini er ætlanin at arbeiða víðari við at útgreina tey øki/bygningar, ið skulu verða umfatað av hesum reglum.

**Funktión:**
Nýggja norður tribunan á Tórsvølli er ætlað sum ein blandaður skrivstovu- og almennur bygningur.

Ovasta hæddin er til skrivstovur til tey ymisku ÍSF sambondini. Vegginir eru uppbygdir í modulum, og tískil er møguleiki at flyta veggir, um tørvurin á skrivstovuhølum broytist við tíðini.

Miðhæddin er til almenn endamál, sum t.d. ítróttarsavn ella líknandi. Miðhæddin er opin og skal ætlandi virka sum ein týdningarmikil partur av nýggja "ítróttartorginum".

Niðasta hæddin skal rúma hallartengt ítróttarvirksemi. Rúm verður fyri fimleikahøllum og skiftingarhølum. Tey ymisku ítróttarsambondini hava stóran tørv á goymslurúmum, og tískil eru eisini tvey stór goymslurúm í kjallarahæddini.

**Frágreiðing av konstruktión:**
Teir berandi veggirnir í niðastu hæddini eru stoyptir á staðnum. Hetta er orsakað av, at kjallarin fyri ein stóran part er undir jørð, og tískil er trýstið stórt.

Mið- og 1. hæddin er bygd sum ein súlu/bjálka konstruktión. Súlur og bjálkar eru úr beton og berandi í facaduni. Hetta gevur møguleika at facadan verður bygd sum ein løtt, ikki berandi, stál / glas konstruktión.

Dekkið er ætlað sum spenndekk elementir. Spenndekk elementir hava eina stóra spennivídd, og er hetta sera týdningarmikið fyri at fáa eina fleksibla innrætting.

Takið er uppbygt av stálbjálkum, ið skulu bera eina lætta takkonstruktión.

Høvuðsinngongdin til bygningin er kjarnan í bygninginum. Tað er bygt upp við beton elementum og er berandi fyri vind trýstinum, ið er á bygningin.

Tey berandi elementini í bygninginum skulu ikki bert hava eina statiska funktión, men skulu eisini verða dekorativ.

Hetta gevur bygninginum dám av einari lættari konstruktión, ið fellur væl í umhvørvið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000,00 av íløgum til byggiskrá.

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera byggiskrá til bygging av ítróttarbygningi at hýsa m.a. fimleikahallir í norðara enda av Tórsvølli. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisitingina og trivnaðarfyrisitingina.

Í sambandi við byggiskrá fyri bygningin skal hetta gerast í samstarvi við avvarðandi partar og feløg.

Byggiskráin verður at leggja fyri nevndina 19. oktober 2005.

Samtykt at seta kr. 300.000,00 av íløgunum til ger av byggiskrá.

Málið verður lagt fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**156/05** **2002-2215**

**Eldraráð í Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í eldraálitinum, sum ein politiskur/fakligur arbeiðsbólkur gjørdi fyri Tórshavnar kommunu í 1998, var mælt til at seta á stovn eldraráð at vera bindilið millum borgararnar og býráðið á eldraøkinum. Býráðið skuldi sambært tilmælinum hoyra eldraráðið um øll uppskot viðvíkjandi teimum eldru.

Táverandi býráð samtykti einmælt at brúka álitið sum grundarlag undir framtíðar arbeiði kommununnar á eldraøkinum.

Núverandi býráðsmeirilutin hevur sett sær fyri at seta á stovn eldraráð í kommununi, hóast eldraøkið ikki enn er lagt út til kommununa at umsita.

Fyri at tey gomlu frá byrjan av skulu hava ávirkan á arbeiðið, verður mælt til, at tey eisini eru við í fyrireikingunum til stovnsetan av eldraráði í kommununi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at arbeiðsbólkur verður settur at tilevna uppskot til reglugerð fyri virksemið hjá ráðnum. Arbeiðsbólkurin skal eisini gera tilmæli um, hvussu ráðið skal verða sett saman, um tað skal veljast beinleiðis millum pensiónistarnar í kommununi, ella tað skal tilnevnast eftir tilmæli frá pensiónistafeløgnum og brúkarunum av Tilhaldinum.

Mælt verður til, at arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri pensionistafeløgini í kommununi, brúkarunum av Tilhaldinum og leiðarunum fyri Heimavitjunartænastuna og Tilhaldinum.

**Sosiala nevndin 1. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum tó soleiðis, at arbeiðsbólkurin verður mannaður bert við umboðum fyri tey gomlu og einum umboði fyri kommununa, sum verður skrivari hjá bólkinum.

Nevndin er eisini samd um, at í arbeiðssetninginum skal verða ásett, at ráðið skal veljast beinleiðis.

Arbeiðsbólkur mannaður við tveimum umboðum fyri Pensiónistafelagið, tveimum umboðum fyri Tilhaldið og einum umboði fyri Dagtilhaldið í Kollafirði handaði 13. mai 2005 kommununi álit um stovnsetan av eldraráði og uppskot til viðtøkur fyri eldraráð í Tórshavnar kommunu. Leiðarin fyri Heimavitjunartænastuna hevur verið skrivari hjá arbeiðsbólkinum.

Álitið er soljóðandi:

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**

Eldraráðið ráðgevur kommunustýrinum í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommununa.

Eldraráðið kemur við hugskotum og virkar fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

Eldraráðið kann:

- úttala seg um eitthvørt evni, sum hevur áhuga hjá teimum gomlu
- koma við hugskotum og uppskotum
- seta spurningar til kommunustýrið um eldrapolitikkin og fíggjarætlanina.

Eldraráðið eigur ikki at viðgera mál viðvíkjandi ávísum persónum.

**Viðtøkur fyri Eldraráðið**
**§ 1 Endamál**

Eldraráðið er ráðgevi hjá kommunustýrinum, og fær í lag samskifti millum eldru borgararnar og kommununa.

Stk. 2
Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samarbeiða við kommunustýrið fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynksir og tørv teirra eldru.

Stk. 3
Eldraráðið skal koma við hugskotum og virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

## § 2 Heimild

Eldraráðið veitir kommunustýrinum ráð í eldrapolitiskum spurningum og virkar sum ein samskiftisstovnur millum borgarar og kommunustýrið í sambandi við tilrættaleggingina av eldrapolitikkinum.

Stk. 2
Kommunustýrið kann spyrja Eldraráðið um tað, sum viðvíkur teimum eldru.

Stk. 3
Einstøku kommununevndirnar samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.

Stk. 4
Eldraráðið kann av sínum eintingum siga kommunustýrinum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar.

## § 3 Starvsháttur Eldraráðsins

Eldraráðið skal kunna seg um ynskir og tørv teirra gomlu og um kommununar viðurskifti á eldraøkinum.

Stk. 2
Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til tey eldru um broytingar og nýskapan á eldraøkinum.

Stk. 3
Eldraráðið skal halda fast um og útbyggja samskiftið vid Kommunustýrið gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á eldraøkinum, og harvið menna og tillaga tey samsvarandi samfelagsmenningini.

Stk. 4
Eldraráðið eigur at hoyra tær staðbundnu nevndirnar (Kollafjarðar-Nólsoyarnevndina o.s.fr.) í málum á eldraøkinum.

## § 4 Eldraráðsins samanseting

Valdir verða 5 limir og 5 varalimir til Eldraráðið.

Stk. 2
3 teir fyrstvaldu varalimirnir kunnu eisini møta á øllum fundum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt.

Stk. 3
Valskeiðið er 4 ár frá 1- ? 2005/2006?

Stk. 4
Limur í Eldraráðnum kann frítakast fyri limaskap eftir áheitan. Avgerð, um limur verður frítikin, tekur Eldraráðið.

Stk. 5
Um ein limur í valskeiðnum missir valbari, doyr ella verður frítikin sambært §4, stk. 4, kemur varalimur inn í tí raðfylgju, teir eru valdir.

Stk. 6
Er eingin varalimur á varalistanum at seta ístaðin, verður eykaval í samráð við Tórshavnar kommunu.

## § 5 Val til Eldraráðið

Val til Eldraráðið er 4. hvørt ár ta fyrstu vikuna í ?

Stk. 2
Valbari og atkvøðurætt hava allir borgarar í kommununi, sum valdagin hava fylt 60 ár. Borgarar, sum hava fastan bústað í kommununi, og sum fáa avlamispensión, og sum ikki hava fylt 60 ár hava valbari og atkvøðurætt til Eldraráðið.

Stk. 3
Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skriftlig boð um hetta í seinasta lagi 4 vikur áðrenn, valið verður hildið. Saman við valevnisfráboðanini eigur at fylgja undirskrift hjá minst 5 stillarum, sum lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið. Eingin kann vera stillari fyri meira enn einum valevni.

Stk. 4
Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillaði.

Stk. 5
Valið skal fara fram við brævatkvøðu.

Stk. 6
Kommunustýrið ásetir nærri reglur um valið, herundir um freistir, vallistar, atkvøðugreiðsluna, kunngerð og uppgerð av valinum, klagur um valið v.m.

## § 6 Stovnan og arbeiðsháttur

Eldraráðið skipar seg við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.

Stk. 2
Eldraráðið ásetir sjálvt fundarskrá sína, hvussu ofta fundir skulu verða, reglur fyri dagsskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátt.

Stk. 3
Dagsskrá og fundarfrásøgn skal sendast til kommunustýrið. Fundarfrásøgnin er almenn við virðing fyri tagnarskylduni.

Stk. 4
Tað er sjálvboðið at vera limur í Eldraráðnum. Samsýning verður ikki latin, men limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Stk. 5
Kommunustýrið setir eina upphædd á fíggjarætlanini fyri Eldraráðsins virksemi.

Stk. 6.
Kommunan veitir skrivstovuhøli, fundarhøli og skrivarahjálp til Eldraráðið.

## § 7 Gildiskoma/Íverksetan

Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar í kommunustýrinum.

## § 8 Broytingar í viðtøkunum

Eldraráðið, ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til kommunustýrið um broytingar í viðtøkunum.

Stk. 2
Kommunustýrið kann koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

Stk. 3
Broytingar í viðtøkunum koma í gildi, tá tær eru samtyktar í kommunustýrinum.

## § 9 Um at taka Eldraráðið av

Kommunustýrið kann til eina og hvørja tíð gera av, at Eldraráðið verður tikið av. Áðrenn tílíka avgerð verður málið í góðari tíð frammanundan lagt fyri Eldraráðið til ummælis.

Stk.2
Verður Eldraráðið tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til Tórshavnar kommunu.

**Sosiala nevndin 7. juni 2005:** Fyri arbeiðsbólkin møttu Jákup Lindenskov, Frida Hansen, Poula Christiansen, Karin Jacobsen og Jónvør Christiansen.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum til Eldraráð í Tórshavnar kommunu og uppskotinum til viðtøkur fyri Eldraráð við hesum broytingum:

§ 4, stk.. 3, verður orðað soleiðis:
"Valskeiðið er 4 ár. Fyrsta valskeiðið Eldraráðsins er tó 1. januar 2006 til 31. desember 2008".

§ 5, stk.. 1 verður orðað soleiðis:
"Val til Eldraráðið er 4. hvørt ár tað fyrstu vikuna í oktober, fyrstu ferð tó síðstu viku í november 2005".

§ 5, stk.. 2 verður orðað soleiðis:
"Valbæri og atkvøðurætt hava allir borgarar í kommununi, sum valdagin hava fylt 60 ár".

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til viðtøkur.

**Býráðið 23. juni 2005:** Einmælt samtykt.

**157/05** **2005-0511**

**Kanning av tørvi á stovnsplássum til eldri í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eftir áheitan frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum hevur Heimarøktin saman við stovnsleiðarunum í kommununi gjørt eina tørvskanning á stovnsplássum til eldri í Suðurstreymoy. Kanningin umfatar ikki Kollafjørð, sum í heimarøktarhøpi hoyrir undir økið Norðstreymoy og Vágar.

Kanningin vísir, at tørvurin er hesin:

31 røktarheimspláss
28 ellisheims-/sambýlispláss
24 pláss til minnisveik
16 pláss til sinnisveik
6 pláss til alkoholmisbrúkarar

Um døgnrøkt var skipað í kommununi, vildi tørvurin á røktarheimsplássum verið 7 færri. Tá Heimið við Vallalíð letur upp, minkar tørvurin á búplássum til minnisveik við 16.

**Sosiala nevndin 1. mars 2005:** Nevndin varð kunnað um kanningina.

**Ískoyti:**
Við støði í skrásetingunum hjá Heimarøktini av røktartørvinum hjá tí einstaka brúkaranum hevur Almanna- og heilsumálastýrið nú latið gjørt eina nýggja kanning, sum vísir, at tá Heimið við Vallalíð og nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn eru tikin í nýtslu, er tørvurin í Suðurstreymi:

16 røktarheimspláss
29 ellisheimspláss
4 pláss til minnisveik
3 sambýlispláss

Tilsamans er sostatt tørvur á 52 plássum

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at farið verður undir fyrireikingar at byggja nýtt ellis- og røktarheim at nøkta tørvin á eldrabústøðum, og at játtaðar verða kr. 100.000,- av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiskrá.

Fyri at lætta um bráðneyðuga tørvin verður samstundis mælt til at keypa eini hús við 8 til 10 ellisheimsplássum.

**Sosiala nevnd 7. juni 2005:** Samtykt at taka undir við at farið verður undir fyrireikingar at byggja nýtt ellis- og røktarheim, og at játtaðar verða kr. 100.000,- av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiskrá.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**158/05** **2004-0660**

**Nýtt røktarheim við Hoyvíkstjørn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tá kommunan keypti gomlu marinustøðina, var samstundis gjørt av, at bygningurin og økið rundanum burturav var brúkt til frama fyri tey gomlu í kommununi.

Umsitingin hevur latið kannað, um møguligt er at byggja eitt røktarheim á økinum. Mett verður, at møguleiki skuldi verið fyri at bygt eitt røktarheim á økinum við pláss fyri 24 búfólkum.

Ognin matr. nr. 1056d og 1056e liggur í A1 øki, men sambært plandeildina er økið eisini umfatað av serstøku byggisamtykt nr. 7, sum er útlagt sum E-øki, kannað almennum endamálum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna dispositiónsuppskotið við tíðarætlan, dagfest september 2004.

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

Bygginevndin og býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggju kostnaðarmetingina uppá íalt kr. 28.081.364,00 við 6,25% mvg, og at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku í innbodnari licitatión.

Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Sosiala nevndin 7. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at góðkenna nýggja kostnaðarmeting uppá kr. 28.081.364,00, og at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku millum í minsta lagi 5 arbeiðstakarar.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**159/05** **2005-1530**

**Endurnýggjan av leigusáttmálanum við p.f. Telefonverkið, 500 m² av matr. nr. 1230b.**

Talan er um leigumál, sum telefonverkið hevur yvirtikið frá Rás Tórshavn, og sum skal leingjast í 10 ár.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til, at leigusáttmálin verður longdur.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**160/05** **2005-1531**

**Íløgukarmar fyri árini 2006-2008**

Fyri betur at kunna málstýra ætlaðu íløgunum komandi trý árini, er uppskot gjørt til íløgur innan ymsu økini.

Uppskotið er gjørt við støði í tí íløgutørvi, kommunan hevur.

Uppskotið eigur at verða endurskoðað á hvørjum ári.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Framlagt og verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 23. juni 2005:** Framlagt og umrøtt.

**161/05** **2005-1173**

**Kommunala Brennistøðin: Roykreinsing - útboð og licitatión**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál 2004-0090 (Projektuppskot: Kommunala Brennistøðin - 10 ára ætlan –RAMBØLL), har heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005 avgjørdi at biðja um tilboð uppá roykreinsing til brennistøðina.

Rambøll hevur vegna Tórshavnar kommunu biðið tríggjar veitarar um tilboð uppá roykreinsing og licitatiónin varð hildin 2. mai 2005.

Á eykafundinum 12. mai 2005 framleggur umsitingin saman við Rambøll tilboðini fyri nevndini, saman við tilmæli.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. mai 2005:** Bettina Kamuk frá Rambøll kunnaði um tilboðini.

Nevndin samtykti, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur skjótast til ber.

**Ískoyti:**
Rambøll móttók hin 2. mai 2005 tilboð uppá roykreinsing frá ALSTOM Danmark A/S, Filcon A/S og Simatek A/S. Hesir tríggir tilboðsgevararnir vórðu valdir út frá kunnleika Rambølls til royndir teirra við líknandi verkætlanum, og hava teir eitt koncept, ið er attraktivt til smærri brennistøðir.

Rambøll hevur hin 14. juni 2005 latið Tórshavnar kommunu eftirmeting av tilboðunum og tilmæli, j. nr. 2005-1173/9. Eftirmetingin er grundað á:

- Tilboð móttikin hin 2. mai 2005
- Samskifti millum tilboðsgevarar og TK/IRF/Rambøll
- Fund við tilboðsgevarar hin 20. mai 2005
- Endurskoðað tilboð frá Alstom hin 27. mai 2005, endurskoðað tilboð frá Filcon hin 25. mai 2005 og endurskoðað tilboð frá Simatek 27. mai 2005.

Metingarstøði (kriterie) fyri tillutan av sáttmála er sambært útbjóðingartilfarinum „hitt fíggjarligt gagnligasta tilboðið", ið framkemur eftir eini ávísari fíggjarligari og tekniskari eftirmeting.

Niðurstøðan hjá Rambøll er, at Alstom hevur tað fíggjarligt gagnligasta tilboðið, og mælir Tórshavnar kommunu og IRF til at taka upp sáttmálasamráðingar við Alstom.

**Viðmerkingar frá umsitingini**
Kommunala Brennistøin tekur undir við argumentatiónini og niðurstøðuni hjá Rambøll. Íløgu- og rakstrartørvur til hetta annleggið er uppsett niðanfyri:

**Íløgutørvur:**

| Postur | Kr. |
|---|---|
| Maskinútbúnaður | 14.238.159 |
| Jørð- og fundament (mett) | 1.200.000 |
| Projekt og ókent (mett) | 3.000.000 |
| Niðurtøka El-filtur (mett) | 200.000 |
| Í alt u/MVG | 18.638.159 |
| MVG 6,25 % | 1.164.885 |
| **Í alt v/MVG** | **19.803.044** |
| Áður játtað (2004) | 1.000.000 |
| **Íløgutørvur (2005 og 2006)** | **18.803.044** |

**Rakstrarkostnaður:**
Út frá upplýsingunum í tilboðnum frá Alstom er greitt, at árligu rakstrarútreiðslurnar til roykreinsiskipanina verða umleið kr. 2,1 mió. um árið u/MVG. Nakað av hesum inngongur í verandi rakstri, so mett verður, at hækkingin í rakstrarútreiðslunum netto verður umleið kr. 1,7 mió. MVG íroknað.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla býráðnum til, umvegis heilsu- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina:

at umsitin gin fær heimild til at samráðast um og gera sáttmála við Alstom um roykreinsiskipan

at játtaðar verða kr. 4.900.000 til arbeiðið av íløgum fyri 2005, soleiðis at írestandi, ið er kr. 13.903.044, verður játtað av íløgum fyri 2006.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 21. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2005:** Bárður Michelsen, leiðari á KB, greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Einmælt samtykt.

**162/05** **2003-1318**

**Rottangatøming í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Á fundi 7. januar 2005 millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og IRF varð avrátt at kanna møguleikan fyri at gera eitt samstarv um rottangaskipanirnar.

Semja var um, at samstarvið skuldi skipast soleiðis, at tað er til fyrimuns fyri báðar partar.

Møguleikin fyri samstarvi stendst av, at IRF hevur 2 rottangabilar, ið koyra tveir 2 vikur á rað og síðani standa stillir triðju vikuna, meðan Tórshavnar kommuna sum kunnugt hevur 1 bil, ið ikki megnar at nøkta tørvin.

Síðani hevur verið samráðst um hetta málið, og er gjørt uppskot til samstarvssáttmála, j. nr. 2003-1318/7.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at Tórshavnar kommuna fer í eitt samstarv við IRF um rottangatøming sambært fyriliggjandi uppskoti til samstarvsavtalu.

Mælt verður til, at neyðugur peningur verður avsettur á fíggjarætlanini fyri 2006, og at samstarvið sostatt kann byrja frá 1. januar 2006.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 21. juni 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Hildur Eyðunsdóttir, Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 1.317.500,00 fíggjað av rakstri í 2006 og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir til at kommunan sjálv stendur fyri rottanga-skipanini og útvegar sær rottangabil til endamálið.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í heilsu- og umhvørvisnevndinil og at gera 1 ára sáttmála.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, tekur undir við minni-lutanum í heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Fyrst var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjar-nevndini, sum var samtykt við 8 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðuns-dóttir, Kári Árting Katrin D. Jakobsen, Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen.

Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**163/05** **2005-1576**

**Yvirtøka av svimjihøllini í Hesti.**

Hest Svimjihallarnevnd ynskir at skeyta og endaliga avhenda kommununi ogn sína matr. nr. 13, Hest, til víddar 391 m², fyri kr. 1,00.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at yvirtaka ognina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at yvirtaka ognina.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19.25**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Kári Árting | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |